## Konmansmýra skiftir navn

Barnagarðurin og vøggustovan á Konmansmýru í Havn skiftir nú navn. Nýggja navnið verður kunngjørt týsdagin, tá stovnurin hevur opið hús millum klokkan 16 og 18. - Í 1892 stóð greinastubbi í "Føringatíðindi" um at "Barnagoymslan" í Havn varð komin í lag. Barnagoymsla eru vit ikki, men heldur ein stovnur í menning, siga starvsfólk í Barnagarðinum og vøggustovuni á Konmansmýru í Havn. Vøggustovan á Konmansmýru fylti 25 ár 1 mars í ár, og nú fyllir Barnagarðurin 25 ár. - Aftan á 25 ár er stovnurin lagdur saman til eina eind, og stórar broytingar standa fyri framman. Tí fara vit at skifta samleika og verður nýggja heiti avdúka 1. juli. Í hesum sambandi bjóða vit til opið hús týsdagin 1. juli frá kl. 16.00 til 18.00. Hendan dagin hevði tað glett okkum at sæð nógv tykkara, ið hava og hava havt tilknýti til stovnin, siga starvsfólkini.



## Lítil og eingin útróður

Bæði snellubátarnir og teir smáu línubátarnir lata illa at fiskiskapinum. Allastaðni verður sagt sagt frá vánaligum fiskiskapi, tí eru eisini fáir bátar á floti, tó so - onkur hevur fingið onkran hampuliga dag. Hesa tíðina eru tað fleiri, sum plaga at royna kalvalínuna, men kalvin er ringur at selja, prísurin hevur onkran dagin verið niðanfyri 40 krónur fyri kilo.

# Toskurin fer at koma aftur

**Ein av teimum, sum dúgliga hevur vitjað á marknaðarplássinum í Vágsbotni við fiski seinnu árini, er Mortan Johannesen, Mortan hjá Andriasi í Hvannasundi. Hann heldur, at batar eru at hóma, sum fara at gera, at meira fiskur verður at fáa, sum tíðin líður**

**ÚTRÓÐUR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag, tá torgið í Vágsbotni alment varð tikið í nýtslu, var hann feskum fiski, og longu í mánamorgunin var hann aftur við feskum fiski og livur.

- Í morgun havi eg selt fyri 3.000 krónur. Tað eru serliga miðalaldrandi fólk og eldri, sum koma fram við at keypa. Tey ungu eru ikki so røsk at keypa fisk. Tað hevði tí verið gott, um tey tilkomnu beinleiðis mintu tey ungu á, at fiskur er góður og bíligur døgurðamatur, sum eisini er góður fyri heilsuna.

Mortan sigur, at ein donsk kvinna, sum ein dagin herfyri vildi keypa fisk fyri 100 krónur, gjørdist bilsin, tá hon sá, hvussu nógv hon fekk fyri pengarnar.

- Hon gjørdi tí ikki matari enn at keypa fyri 300 krónur og segði, at hon fór at taka fiskin niður til Danmarkar við sær – við flogfari – so tey kundu leggja fløkini á grilluna til okkurt ávíst høvi.

Mortan Johannesen sigur, at sølan sum heild gongur rímiliga væl, og hann heldur, at nýggja torgið er sera kærkomið.

- Alt gott um teir handlar, sum selja fisk um diskin. Men allir havnabýir hava eitt fiskatorg, og eg fegnist um, at torgið í Vágsbotni nú er vorðið veruleiki, sigur útróðrarmaðurin.

### Verður betri

Mortan ásannar, at tað hevur sæð heldur svart út við fiski í longri tíð, men hann heldur samstundis, at batar eru at hóma.

- Eg vil siga, at vit eru á botni, tá ræður um tosk. Nú kann tað ikki blíva verri, enn tað er.

Útróðrarmaðurin, sum meginpartin av lívi sínum hevur balst á havinum, heldur, at týðilig tekin eru um, at góður gróður hevur verið í sjónum higartil í summar.

Hetta samsvarar eisini væl við tær mátingar, sum Fiskirannsóknarstovan ger.

- Eg haldi meg síggja ábendingar um, at tað er við at venda, soleiðis at fiskur fer at koma aftur. Vit, sum hava fiskað eitt langt lív, kenna gongdina, sum altíð er – og fer at vera - aftur og fram.

Mortan Johannesen heldur, at trýstið á fiskastovnarnar er ov stórt, og tí er hann ikki ósamdur við teimum, sum siga, at stig mugu takast til tess at byrgja upp fyri, at stovnarnir verða ov hart troyttir.



*- Eg haldi, at ábendingar eru um batar, nú gróðurin í sjónum hevur verið so góður, sigur Mortan Johannesen, útróðrarmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Silver Fjord bygdur á Skála

**Skipið, sum P/F Fresh Link hevur leigað til fiskaflutning millum Føroyar og Scrabster, er nýbygningur á Skála nummar 41, fyrrverandi Star Saga**

**SKIP**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Fresh Link, sum er nýstovnaða felagið, ið fer at reka farmaflutning við fiski úr Føroyum til Scrabster, hevur leigað skipið Silver Fjord, sum er eitt køli-og frystiskip burtur av.

- Skipið er bygt á Skála Skipasmiðju í 1984 og er umbygt í Noreg í 1999. Silver Fjord er stórt skip og siglir við góðari ferð. Leigusáttmálin er galdandi í trý ár, segði felagið í tíðindaskrivi.

Vit hava frætt frá lesara, sum hevur áhuga fyri skipum, at farmaskipið, sum nýggja flutningsfelagið hevur leigað, er fyrrverandi Star Saga, sum er bygd á Skála Skipasmiðju í 1984.



*Silver Fjord er fyrrverandi Star Saga, sum er bygd á Skála Skipasmiðju í 1984*



*Her liggur Silver Fjord við slagsíðu út fyri havnini í Slite á Gotlandi í desember í fjør*

Lesarin hevur hugt í listan yvir nýbygningar á Skála Skipasmiðju og er komin til, at Star Saga er bygd hetta árið sum nýbygningur nr. 41.

Árið fyri (1983) bygdi Skála Skipasmiðja eisini Star Viking.

### Panamaflagg

Á eini heimasíðu www.gotlandske.se er stuttur greinastubbi við mynd av Silver Fjord hin 10. desember í 2007.

Her stendur, at skipið Silver Fjord, sum siglir undir Panama-flaggi, fekk slagsíðu út fyri Slite á Gotlandi, men er komið til lands í øllum góðum.

Tað var Sjøredningscentralen Gøteborg, sum fekk fráboðan um slagsíðuna, sum var millum 5 og 10 stig í stýriborð.

Við hjálp av loðsi sigldi skipið við egnari hjálp inn í havnina í Slite á Gotlandi.

Í greinastubbanum stendur einki um, hví skipið fekk slagsíðu hendan dagin.

